# Roykfrí matstova á Hotel Føroyum

**Glasstovan á Hotel Føroyum hevur verið roykfrí síðan á nýggjárinum. Hetta tiltakið hevur ikki minkað um umsetningin, sigur sølustjórin á hotellinum**



*Glasstovan á Hotel Føroyum gjørdist á nýggjárinum tann fyrsta roykfría matstovan í landinum, sigur Birna Jacobsen, sølustjóri*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

HEILSUMÁL
*Edvard Joensen*

Sum tann fyrsta matstovan í landinum gjørdist Glasstovan á Hotel Føroyum roykfrí á nýggjárinum.

Hendan royndin hevur verið góð, sigur Birna Jacobsen, sølustjóri á Hotel Føroyum. Í hvussu er hevur hon ikki ávirkað umsetningin hjá matstovuni negativt, sigur hon, Heldur hinvegin.

Tað ger so, at tey hava gjørt av at hava matstovuna roykfría permanent, og at døma eftir eini kanning, tey hava gjørt millum viðskiftafólkið, er hetta ein røtt avgerð, vísir hon á.

Kanningin, sum Gallup hevur gjørt fyri hotellið, vísir, at stórur meiriluti av teimum spurdu, bæði roykjarum og ikki roykjarum, halda, at Glasstovan eigur at vera roykfrí. Ikki færri enn 84 prosent av samlaðu luttakarunum í kanningini, eru fyri hesum.

Bæði millum roykjarar og ikki roykjarar er meiriluti av teimum, sum vilja hava matstovuna roykfría. Ikki færri enn 63 av roykjarunum halda tað vera í lagi við roykfríari matstovu.

Ikki óvæntað eru heili 91 prosent av ikki roykjarunum fyri hesum tiltakinum.

Eisini hava tey í kanningini spurt, hvat fólk halda um, at hotellið, alt sum tað er, skal vera roykfrítt. Har er býtið helvt um helt av teimum, sum vóru við í kanningini. 50 prosent prosent til hvønn partin.

### Ávirkan uttaneftir

Tað er í samband við roykfría dagin týsdagin 31. mei, at hesi tølini verða kunngjørd nú, sigur Birna Jacobsen.

Men sjálvt tiltakið hjá Hotel Føroyum er ávirkað av gongdini á hesum økinum uttanlands. Har gerst tað alt meira vanligt í alt fleiri londum, at slík støð sum matstovur og gistingarhús yvirhøvur gerast roykfrí. Nevnd verða lond sum Írland, Italia, Malta og Noreg, sum undangongulond. Eisini í Svøríki kemur roykiforboð í gildi á matstovum og almennum støðum frá 1. juni í ár.

Belgia fer eisini at seta eitt roykiforboð á matstovum í gildi frá 2007. Tó verður hetta forboð heldur meira avmarkað enn í øðrum ES londum.

### Verja starvsfólkið

Umframt at koma viðskiftafólkinum, sum ikki roykir, til góðar, er átakið eisini gjørt fyri at verja starvsfólkið, sum dagliga ferðast í matstovuni, sigur Birna Jacobsen.

Kanningar hjá danska »Arbejdsmiljøinstituttet« vísa, at í Danmark doyggja fimm til tíggju tænarar árliga av passivari royking.

Hóast matstovan á hotellinum er roykfrí, eins og fundarhøli eisini eru tað, er tað kortini ikki fullkomið roykibann. Tað privatar veitslur verða hildnar, er tað verturin, sum ger av, um roykjast kann ella ikki, sigur Birna Jacobsen, sølustjóri á Hotel Føroyum. Og í barrini í móttøkuhøllini, á Vaglinum og í einstøkum gistingarrúmum á hotellinum ber eisini til at roykja, sigur hon.

Kanningin, sum Gallup hevur gjørt fyri Hotel Føroyar, vísir eisini, at í mun til 2003 minkaði samlaða talið av roykjarum í 2004 við seks prosentum.

# Rossafestivalur í Vágum

**Leygardagin verður gongulagskapping fyri íslandsross við flúgvarabedingina Niðri við Vatn í Vágum. Eisini onnur tiltøk verða á skránni hendan dagin**

RÍÐING
*Edvard Joensen*

**Vágar:** So fáa Vágar sín egna festival. Tó ikki ein tónleikafestival, uttan ein rossafestival, sum hildin verður á ríðibreytini Niðri við Vatn um vikuskiftið.

Umframt kappríðingar verða eisini onnur tiltak sum eitt nú ponyríðing fyri børn, hoppiborg, søla av kaffi, pylsum cowboyhattum og tílíkum.

Um kvøldið verður felagsbál og sangur. Jóhann Mortensen fer at halda midnáttarrøðu, og aftan á verður dansur, har Vága-Jam fara at spæla.

Kappríðingar vera sjálvandi eisini á eini slíkari stevnu. Bæði gonguglagskapping fyri íslandsross og kappríðing, har tað ræður um at vera fyrstur á mál.

Vága Ríðingarfelag, sum skipar fyri tiltakinum, sigur, at umframt tær vanligu kappingarnar, verður eisini kapping fyri old boys.

Gongulagskappingin byrjar leygarmorgunin klokkan 10.00. Klokkan 17.00 seinnapartin verður kappríðing, og tá byrja eisini hini tiltøkini, sum vera í samband við stevnuna.

Sjálv finalan í gongulagskappingini verður hildin sunnudagin klokkan 15.00, boðar Vága Ríðingarfelag frá.



*Gongulagskapping verður á ríðibreytini hjá Vága Ríðingarfelag Niðri við Vatn um vikuskiftið*
*Savnsmynd*